# Tað verða framvegis tveir dystir

**Uppskotið hjá B71 um upp- og niðurflytingardystir fekk bert tvær atkvøður á aðalfundinum**

FSF-FUNDUR
*Jákup Mørk*

Eitt av tveimum innkomnum málum á aðalfundinum hjá FSF var uppskotið hjá B71 um, at framyvir skuldi tað bert verða tann eini dysturin, sum avgjørdi spurningin um upp- og niðurflyting.

Sandoyingar grundaðu uppskotið á, at tá tað var somikið seint út á kappingarárið, so mundi tað vera felags áhugamál hjá øllum pørtum at greiða spurningin um upp- ella niðurflyting skjótast gjørligt.

### Stór mótstøða

Tað var tó skjótt greitt, at mótstøðan ímóti uppskotinum var toluliga sterk. Fleiri feløg tóku til, at við bert einum dysti slapp tilvildin at ráða í ov stóran mun, og tó at sandoyingar vístu á, at eitt nú steypakappingin bert verður avgjørd yvir ein dyst, so tóktist hetta ikki at rína við.

Somueliðis varð ført fram, at hetta kundi verða nakað, ið kom at merkja mistar inntøkur fyri feløgini. Talan er ofta um dystir, har hampuliga nógvir áskoðarar koma at hyggja, og skuldi dysturin verið avmarkaður til ein dyst á uttanveltaðum vølli, vildi hetta viðført færri áskoðarainntøkur.

Einasta felag, sum stuðlaði B71 í hesum var MB. Skemtiliga tók Frits Witt til, at tað mundi ikki vera nakar, sum hevði eins drúgvar royndir við upp- og niðurflyting sum sandoyingar og vágafólk, og í hansara verð var eingin ivi.

Og tá atkvøðurnar vórðu taldar upp, var greitt, at hesar vóru í tráð við orðaskiftið. Tað var bert atkvøðan hjá MB, sum legðist aftur teirri hjá B71, og fall uppskotið sostatt dyggiliga til jarðar. Nakað sum viðførdi eina heldur smílandi viðmerking frá øðrum av umboðunum hjá B71. »So mugu vit bara syrgja fyri at flyta beinleiðis upp komandi ár« helt Eli Hentze, sum vegna B71 førdi orðið í hesum sambandinum.



*- So mugu vit bara syrgja fyri at flyta beinleiðis upp komandi ár, helt Eli Hentze, tá tað var greitt, at uppskotið hjá B71 um og- og niðurflyting ikki fekk undirtøku á aðalfundinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Talvið hesa vikuna

Siðvanda superstórmeistarakappingin Linares, byrjaði um vikuskifti. Ein óhugnalig sterk kapping við hesum luttakarum: Kasparov, Kramnik, Anand, Leko, Ponomariov, Radjabov og Vallejo Pons. Telvast skulu tvær reisir móti hvørjum øðrun, tvs. tólv umfør. Tvey umfør eru í skrivandi løtu leikt, og ein sensatión er longu hend. Og talan er ikki um nakra lítla sensatión, men um eina stórhending. 15 ára gamli Teimour Radjabav, sum luttók í 1st Tórshavn International í 2000, vann við svarta fólkinum á sjálvum Kasparov! Seinast Kasparov tapti eitt talv í slíkum superstórmeistarakappingum (her er dysturin móti Kramnik í 2000 og kviktalv ikki talt við), var í 1999 ímóti vælkenda Ivan Sokolov. Landsmaðurin Radjabov hevur tí veruliga brotið ein mentalan múr.
Á hendan hátt vann unglingurin á “ódjórinum við túsund eygum”:

**Kasparov,G (2847) - Radjabov,T (2624)**
Linares Super GM (2), 23.02.2003

1.**e4 e6 2.d4 d5 3.Ric3 Rif6 4.e5 Rifd7 5.f4 c5 6.Rif3 Ric6 7.Be3 a6 8.Fd2 b5 9.a3 Fb6 10.Rie2 c4** (teoretisk nýggjheit, og áhugavert at læsa drotningasíðuna) **11.g4 h5 12.gxh5 Rxh5 13.Rig3 Rh8 14.f5 exf5 15.Rixf5 Rif6!** (góður háttur at útjavnað. Ringt at meta um nakar hevur fyrimun, støðan tykist jøvn) **16.Rig3 Rig4 17.Bf4 Be6 18.c3 Be7 19.Rig5 0—0—0 20.Rixe6 fxe6 21.Be2 Rigxe5!** (djarvt telvað av Radjabov! Tekur Kasparov ímóti offrinum kemur d4 við herjandi megi og góðum spæli fyri offraða riddaran, og harvið praktiskum kjansum) **22.Fe3! Rid7 23.Fxe6 Bh4 24.Fg4?** (ífylgju Fritz 7, var Fxd5 besti leikur,) 24...g5! (svartur hevur nú fyrimun) **25.Bd2 Rde8 26.0—0—0 Ria5! 27.Rdf1? (Rætti leikur var Kb1.** Sigast skal at báðir telvarar vóru í svárari tíðarneyð) **27...Rib3+ 28.Kd1 Bxg3 29.Rf7** (um Kasparov tók aftur á g3, hevði Radjabov leikt Fg6, sum hóttur mát og er avgerandi) **29...Rd8 30.Bxg5**




**Fg6!** (hóttur, umframt rókin, mát í tveir leikur) **31.Ff5 Fxf5 32.Rxf5 Rdf8** (Radjabov hevur nú mann meir, og restin er lættliga vunnið. Kasparov, sum í hesu løtu uttan iva er við at spreingjast av øði, treiskast tó eitt sindur) **33.Rxf8+ Rixf8 34.Bf3 Bh4 35.Be3 Rid7 36.Bxd5 Re8 37.Bh6 Ridc5 38.Bf7 Re7 39.Bh5 Rid3 0—1**

# Fyrrverandi rumenskur landsliðsleikari skal venja við B36

**Álvarsami skaðin hjá Jens Kristian Hansen er orsøkin til, at B36 kannar sær nýggjan verjuleikara**

LEIKARASKIFTI
*Páll Holm Johannesen*

Seinnapartin leygardagin kom rumenski verjuleikarin, Nicolaie Ramfir, til Føroya. Yngra havnarfelagið, B36, skal komandi vikurnar kanna hvørjar dygdir 35 ára gamli rumenin hevur. Eftir álvarsama skaðan hjá Jens Kristian Hansen í Spania, metir leiðslan í B36, at neyðugt er við einum verjuleikara afturat.

- Jens Kristian verður burtur í góðar seks vikur, og uttan at taka nakað frá ungu spælarunum í felagnum, so hava vit brúk fyri einum royndum verjuleikara afturat, sigur B36-venjarin, Ion Geolgau.

Partarnir hava ikki undirskrivað sáttmála enn, men sum skilst, so er rættiliga sannlíkt, at rumenin verður at síggja í B36-troyggjuni í ár.

B36-venjarin kennir væl til dygdirnar hjá Nicolaie Ramfir. Sambært Ion Geolgau er rumenin ein royndur harri, sum er skjótur og sterkur í luftini. Hann hevur eins og B36-venjarin spælt í Universitatea Craiova, men seinnu árini hevur rumenski verjuleikarin spælt í næst bestu deildini í Rumenia.

Nicolaie Ramfir hevur umboðað U-18, U-21, OL-liðnum og A-landsliðið hjá Rumenia. Fyrst í 90 árunum bleiv tað í alt til seks A-landsdystir fyri Rumenia .

Tað kann skoytast uppí, at navnframi rumenski landliðsleikarin, Gheorghe Popescu, og Nicolaie Ramfir spældu saman í miðverjuni hjá Universitatea Craiova frá 1988 til 1990, áðrenn Gheorghe Popescu fór uttanlands at royna eydnuna.

Í fjør vóru royndirnar av útlendsku leikarunum í B36 ikki av teimum bestu, og hvussu Nicolaie Ramfir fer at standa seg, verður spennandi at fylgja komandi mánaðirnar.

# Talvúrslit og endaligar støður

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| TFS | HT | 3-1 |
| KTF | TT | 2,5-1,5 |
| KT | VT | 2-2 |

| Lið | Stig |
|---|---|
| 1. HT | 23,5 |
| 2. KTF | 22,0 |
| 3. TFS | 21,5 |
| 4. KT | 20,5 |
| 5. TT | 20,0 |
| 6. VT | 12,5 |

**2. deild**

| Lið | Stig |
|---|---|
| 1. ST | 29,0 |
| 2. RT | 23,0 |
| 3. KTF 2 | 21,0 |
| 4. VT 2 | 17,5 |
| 5. HT 2 | 16,5 |
| 6. HT 3 | 13,0 |

**3. deild**

Finala:
KT — GT 2,5 — 1,5

| | |
|---|---|
| 1 | KT |
| 2 | GT |
| 3 | HT5 |

**Unglingadeildin**

| Lið | Stig |
|---|---|
| 1. VT | 28,0 |
| 2. GTa | 20,5 |
| 3. KTFa | 19,5 |
| 4. GTb | 18,0 |
| 5. HT | 16,5 |
| 6. KTFb | 16,5 |



# Havnarmenn føroyameistarar

**Við at spíla seg veruliga út í síðsta umfarinum ímóti kollfirðingum við stórmeistara á liðnum, vunnu havnarmenn rættiliga trygt FM-heitið**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Tíggjunda og síðsta umfar í liðkappingini bleiv telvað leygardagin í Kommunuskúlanum. Allar deildir savnaðar saman. Spenningurin var stórur í 1. deild, hóast havnarmenn frammanundan høvdu eina leiðslu uppá hálvtannað stig. Kollfirðingar høvdu nevnliga GM Tiger Hillarp Persson á liðnum + at klaksvíkingar hittu botnliðið úr Vestmanna, og tí kundu teir í høvuðsstaðarfelagnum ikki kenna seg tryggar, als ikki.



*Martin Poulsen sýndi stórspæl á fyrsta borði hjá Havnini. Kollfirðingar høvdu styrkt um liðið við svenskum stórmeistara, men Martin lat ikki við seg koma, og fekk ein flottan javnleik burturúr*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Martin helt móti stórmeistaranum

Teir ungu, Martin Poulsen og Olaf Berg vístu høgan klassa, tá fyrrnevndi leikti javnt móti GM Tiger og Olaf vann á føroyameistaranum Hans Kristian Simonsen. Tað er tó ikki óvanligt at Martin tekur stig frá stórmeistarum. Í heyst vann hann á ukrainskum stórmeistara í kapping í Spania.

Olaf hevði eitt skifti bert eitt stig av fimm møguligum, men vann síðani restina, og endaði tí við góða endaspurti sínum við seks stig um av tíggju. At vinna við svarta fólkinum á Hans Kristian er ikki gerandiskostur á heimliga talvpallinum.

Herluf Hansen leikti ein góðan javnleik móti Torbjørn Thomsen, meðan Haldur Suni Johansen sló sigurin fastan við sigri á Eyðálvur Johannesen.

3-1 til FM vinnarnir, og einki lið hevði nú møguleikan at taka teir aftur. Um vit hyggja nærri at liðunum í 1. deild, er tað ikki óvæntað, at kappingin hevur verið somikið jøvn í ár við fimm liðum í oddastríðnum. Tá havnarmenn í fýra umfør ikki høvdu Martin Poulsen á liðnum, varð væntað at teir fóru at steðga upp og at hini liðini útnyttaðu fráveru Martins. Men nei, Olaf Berg telvaði sum ein annar stórtelvari á fyrsta borðið, og við hesum í huga umframt at hini toppliðini ikki veruliga bitu frá sær, hildu havnarmenn seg allatíð í toppinum.

### Kampurin um annað pláss

Óvæntað vunnu hvalvíkingar heili 3,5 — 0,5 á toftamonnum, og løgdu harvið trýst á klaksvíkingar, sum stríddust móti vestmenningum. Bogi Ziska og Jens Kristian Hansen steðgaðu eitt sindur upp móti endanum av kappingini, og taptu báðir móti hvalvíkingum. Hóast hetta, hevði Jens Kristian eina góða kapping við 7,5 stigum av 10 møguligum.

Ólavur Simonsen, Rani Nolsøe og hinir klaksvíkingarnir vunnu tepurt 2,5-1,5 á vestmenningum, sum longu undan dystinum vóru niðurflytarar. Ólavur og John Rødgaard leiktu javnt.

Góði endaspurturin hjá hvalvíkingum rakk tó ikki til eitt annað pláss. Eins og í fjør tóku klaksvíkingar sær av hesum plássi. Og kenna vit teir rætt, so eru teir ikki nøgdur við annað enn fyrsta pláss.

Sum vit síggja á støðuni aðrastaðni í blaðnum, varð talan um helst tí javnastu kapping nakrantíð, síðani startskotið í 1971. Bert hálvtfjórða stig skilti fyrsta pláss við fimta pláss, sum toftamenn endaðu á. Í 1989 varð tó somuleiðis hálvtfjórða stig millum nr. 1 og 5. Havnarmenn vunnu eisini tað árið.

Tíbetur hevur talvítróttin ikki sama trupulleika sum aðrir ítróttir, har somu 2-3 lið á hvørjum árið mannað toppin og langt er niður til miðplássini.

### Sandavágsmenn aftur í 1. deild

Eitt skifti í fyrru helvt góvu runavíkingar sandavágsmonnum mótstøðu og dyst um fremsta pláss, men seinastu umførini runnu Torkil & Co frá teimum. Spenanndi verður at síggja teir aftur í 1. deild, og hóast teir ivaleyst vera í tyngra endanum, kunna teir fegnast um eina nógv størri breidd í felagnum við dupult so mongum aktivum telvarum í mun til fyri fáum árum síðani.

Runavíkingar fingu eitt flott annað pláss og unga klaksvíksliðið fekk bronsuna. Bæði havnarliðini skuffaðu, og eitt av hesum endaðu aftast.

Kollfirðingar vunnu 3. deild í finaluni móti gøtumonnum, og flyta tí upp í 2. deild.

Vestmanna Talvfelag vunnu unglingadeildina. Gott ungdómsarbeiði seinastu árini hevur givið úrslit, og er samstundis ein góð troyst mótvegis lagnuni hjá 1. liði teirra.



*Høllin í Kommunuskúlanum var stúgvandi full, tá farið varð undir at telvað seinasta umfarið í liðkappingini fyri veturin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*